Skráseting Føroya

# Vegleiðing um

## Stovnan av Íverksetarfelag (ÍVF)

Útgivið av

Skráseting Føroya

oktober 2019

Skráseting Føroya

## Innihaldsyvirlit


1. Innleiðing ..... 3
2. Tilgongdin fram til fráboðanina til Skráseting Føroya ..... 3
3. Krøv til stovnaran ..... 4
   3.1 Einstaklingavirkir ..... 4
4. Vinnufelagalógin og høvuðsskjølini ..... 5
   4.1 Stovningarskjalið hjá íverksetarafelagnum ..... 5
      4.1.1 Hvørjar upplýsingar skulu vera í einum stovningarskjali? ..... 5
      4.1.2 Hvørjar upplýsingar skulu bert vera í stovningarskjalinum undir ávísum umstøðum? ..... 7
   4.2 Viðtøkurnar hjá íverksetarafelagnum ..... 7
      4.2.1 Minsta krav til upplýsingar í viðtøkunum ..... 7
         4.2.1.1 Upplýsingar um rættindi, sum eru knýtt at íverksetarapartinum ..... 8
   4.3 Eigarabókin hjá íverksetarafelagnum ..... 8
5. Navnið hjá íverksetarafelagnum ..... 8
   5.1 Hvørjar avmarkingar eru í valinum av navni? ..... 9
   5.1.1 Kann ynskta navnið kannast frammanundan ..... 9
   5.2 Hjánøvn ..... 9
6. Endamál íverksetarafelagsins ..... 9
7. Kapitalkravið ..... 10
   7.1 Felagskapitalurin ..... 10
   7.2 Inngjald av felagskapitali ..... 10
      7.2.1 Partvíst inngjald av felagskapitali ..... 10
      7.2.2 Inngjald av felagskapitali við øðrum virðum enn kontantum (apportinnskot) ..... 10
      7.2.3 Samansparing av yvirskoti ..... 11
      7.2.4 Vinningsbýti ..... 11
   7.3 Fullgóð kapitaltilbúgving ..... 11
8. Íverksetarapartar ..... 12
   8.1 Fyrisitingarlig og fíggjarlig rættindi ..... 12
   8.2 Navna-íverksetarapartur ..... 12
   8.3 Tekning av íverksetarapørtum ..... 12

9. Leiðslustovnar og valmøguleikar ............ 12
10. Stjórn og uppgávurnar hjá stjórnini ............ 13
11. Val av stjórnarlimum ............ 13
12. Fundarbók og grannskoðanarprotokoll ............ 14
12.1 Fundarbók ............ 14
12.2 Grannskoðanarprotokoll ............ 14
13. Umboðanar- og tekningarrættur ............ 14
14. Roknskaparár, ársfrásøgn og grannskoðan ............ 15
14.1 Roknskaparár ............ 15
14.2 Gerð av ársfrásøgn ............ 16
14.2.1 Frával av grannskoðan ............ 16
14.2.2 Váttanarstandardur ............ 17
14.3 Krav til grannskoðara í sambandi við grannskoðanarskyldu og sjálvbodna grannskoðan ............ 18
14.3.1 Val av grannskoðara ............ 18
14.3.2 Frásetan av grannskoðara ............ 18
14.4 Uppgávurnar hjá valda grannskoðaranum ............ 19
14.5 Revsitiltøk í sambandi við vantandi grannskoðan ............ 19
15. Ábyrgd ............ 19
15.1 Endurgjaldsábyrgd ............ 19
15.2 Nær kemur mann undir endurgjaldsábyrgd? ............ 20
15.3 Revsiábyrgd ............ 20
16. Fráboðan um stovnan av einum íverksetarafelagi ............ 20
16.1 Tær kravdu upplýsingarnar og skjølini ............ 21
17. Umskráseting til vanligt smápartafelag ............ 22
18. Avtøka av íverksetarafelagnum ............ 22

## 1. Innleiðing

Løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin) er ein savnað lóg, sum er galdandi fyri øll parta- og smápartafeløg (kapitalfeløg).

Við løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016, samtykti Løgtingið at innføra ásetingar í Vinnufelagalógina um íverksetarafeløg.

Eitt íverksetarafelag er eitt serligt slag av smápartafelagi, sum kemur undir serligar ásetingar viðvíkjandi kapitali og uppsparing av yvirskoti.

Um ikki annað fylgir av serligu ásetingunum í Vinnufelagalógini um íverksetarafeløg, eru ásetingarnar í lógini um smápartafeløg galdandi fyri hesi feløg. Serligu ásetingarnar um íverksetara-feløg eru at finna í kapitli 19 a í Vinnufelagalógini.

Endamálið við vegleiðingini er at greiða frá viðurskiftum, sum Skráseting Føroya metir vera serliga viðkomandi í sambandi við stovnan av einum íverksetarafelagi.

Vegleiðingin tekur støði í tí einfalda bygnaðinum, sum eitt íverksetarafelag kann hava. Hetta merkir, at ein leiðslubygnaður við bert einari stjórn verður valdur, umframt at tekning av íverksetarapørtum og val av leiðslu og møguligum grannskoðara fer fram í sambandi við stovnanina.

Henda vegleiðing inniheldur ikki eina nágreiniliga gjøgnumgongd av teimum ásetingum og valmøguleikum, sum eru galdandi fyri íverksetarafeløg. Um tað í einum ítøkiligum føri eru serlig viðurskifti ið gera seg galdandi, ella tann nevndi leiðslubygnaðurin ikki verður mettur at vera tann rætti, er tað ein fyrimunur at leita sær serkøna vegleiðing.

## 2. Tilgongdin fram til fráboðanina til Skráseting Føroya

Hesin kapittulin lýsir karmarnir fyri stovnan av einum íverksetarafelagi, og tilgongdina fram til tað er møguligt at skráseta íverksetarafelagið.

Stovnanin av einum íverksetarafelagi fær rættarvirknað frá tí degi, stovningarskjalið er undirskrivað, og til ber at virka vegna felagið frá hesum degi. Fram til skrásetingina av felagnum, skal felagið leggja afturat navni sínum, at felagið er undir stovnan, t.d. ‘Blómuhandilin ÍVF undir stovnan’.

**Felagið skal fráboðast til skrásetingar hjá Skráseting Føroya í seinasta lagi 2 vikur eftir at stovningarskjalið er undirskrivað.**

**Hevur Skráseting Føroya ikki móttikið fráboðanina innan nevndu freist, kann skrásetingin ikki fara fram. Tað er ikki møguligt at víkja frá freistini.**

Tey, ið gera eina avtalu ella átaka sær eina skyldu vegna íverksetarafelagið, ábyrgjast persónliga og við samábyrgd – t.e. at hvør einstakur av stovnarunum hevur skyldu at rinda alla skuld hjá íverksetarafelagnum – fram til skrásetingina av felagnum. Eftir skrásetingina verða rættindi og skyldur yvirtiknar av felagnum. Upplýsingin "undir stovnan" fellur burtur í sambandi við skrásetingina.

Neyðugu stigini til tess at stovna eitt íverksetarafelag, verða skipað í hesi raðfylgju:

1. Gerð av stovningarskjali og viðtøkum.
2. Stovnararnir undirskriva stovningarskjalið, ið inniheldur viðtøkurnar hjá íverksetarafelagnum.
3. Kapitalurin (einans kontant stovnan er møgulig) skal gjaldast inn í seinasta lagi 2 vikur eftir, at stovningarskjalið er undirskrivað, og áðrenn skrásetingina av íverksetarafelagnum. Serlig kapitalkrøv eru galdandi fyri íverksetarafeløg. Sí nærri um hetta undir punkti 7.
4. Íverksetarafelagið skal fráboðast til skrásetingar hjá Skráseting Føroya í seinasta lagi 2 vikur eftir at stovningarskjalið er undirskrivað.

## 3. Krøv til stovnaran

Eitt íverksetarafelag kann verða stovnað av einum ella fleiri stovnarum. Stovnarar kunnu bæði vera likamligir ella løgfrøðiligir persónar.

Kravið til **likamligar persónar** er, at persónurin:

- Skal vera í minsta lagi 18 ára gamal.
- Ikki má vera ómyndigur ella undir verjumáli.
- Ikki má vera farin í gjaldsteðg ella á húsagang.

Kravið til **løgfrøðiligar persónar** er, at tann løgfrøðiligi persónurin:

- Skal hava rættar- og virkisføri. Eitt felag undir stovnan kann sostatt IKKI vera stovnari av einum íverksetarafelag, men skal skrásetast fyrst.
- Ikki má vera farin í gjaldsteðg ella á húsagang.
- Ikki er undir tvingsilsavtøku.

### 3.1 Einstaklingavirkir

Einstaklingavirkir hava ikki neyðuga rættarføri til tess at vera stovnarar av einum felagi. Tað er sostatt tann likamligi persónurin, sum einstaklingarvirkið er tengt at, ið skal vera stovnari.

Um Skráseting Føroya móttekur eina fráboðan um stovnan av einum íverksetarafelagi, við einum einstaklingavirki sum stovnara, verður skrásetingin noktað.

## 4. Vinnufelagalógin og høvuðsskjølini

Løgfrøðiligi karmurin kring stovnanina av einum íverksetarafelagi er Vinnufelagalógin, stovningarskjalið og viðtøkurnar hjá felagnum, ið skulu gerast í sambandi við stovnanina av íverksetarafelagnum.

Stovningarskjalið og viðtøkurnar mugu ikki vera í stríð við tvingandi ásetingar í lógini. Er hetta so, er tað Vinnufelagalógin, ið er galdandi, óansæð hvat stendur í skjølunum.

| | |
|---|---|
| **Reglustigskipan.** | **Tvingandi ásetingar í Vinnufelagalógini** eru ovast. Tær ásetingar í Vinnufelagalógini, ið eru tvingandi, kunnu tískil ongantíð víkja fyri skjølum hjá felagnum.<br><br>**Stovningarskjal** og **viðtøkur** mugu sostatt ikki vera í stríð við tvingandi ásetingar í Vinnufelagalógini.<br><br>**Eigaraavtalur** eru niðast í reglustigskipanini, umslíkar eru gjørdar. Ein eigaraavtala má tískil hvørki vera í stríð við tvingandi ásetingar í Vinnufelagalógini, stovningarskjalinum ella viðtøkunum. |

### 4.1 Stovningarskjalið hjá íverksetarafelagnum

Stovningarskjalið er kjarnan í sambandi við stovnanina av einum íverksetarafelagi. Stovningarskjalið er "føðibrævið" hjá felagnum og er tann avtalan, sum stovnararnir undirskriva fyri at kunna stovna felagið. Eitt stovningarskjal skal innihalda viðtøkurnar hjá íverksetara-felagnum.

Stovningarskjalið verður gjørt og undirskrivað av stovnarunum. Ein frásøgn úr gerðabókini kann ikki nýtast sum stovningarskjal og kann ikki koma í staðin fyri stovningarskjalið.

Stovningarskjalið skal latast inn til Skráseting Føroya í sambandi við, at íverksetarafelagið verður fráboðað til skrásetingar hjá Skráseting Føroya. Stovningarskjalið er eftir hetta alment atkomuligt hjá Skráseting Føroya.

#### 4.1.1 Hvørjar upplýsingar skulu vera í einum stovningarskjali?

Upplýsingarnar, sum altíð skulu vera í einum stovningarskjalið, eru:

- Navn og bústaður hjá stovnarunum av íverksetarafelagnum, umframt skrásetingarnummar, um stovnari er ein løgfrøðiligur persónur.
- Prísurin fyri íverksetarapartarnar (tekningarkursurin fyri íverksetarapartarnar). Kursurin er prísurin fyri 100 kr. av felagskapitali. Um rindast skal 1 kr. fyri 1 kr. av felagskapitali, er kursurin 100. Um rindast skal 10 kr. fyri 1 kr. av felagskapitali, er kursurin 1.000.
- Freistina fyri inngjaldingina av kapitalpørtunum. Inngjaldingin skal fara fram í seinasta lagi áðrenn fráboðanina til Skráseting Føroya.

Harumframt skal upplýsast, um íverksetarafelagið skal rinda kostnaðin fyri stovnanina ella ikki. Um íverksetarafelagið rindar kostnaðin fyri stovnanina, skal stovningarskjalið eisini innihalda metta kostnaðin av hesum.

**Stovningarkostnaður**
Skal íverksetarafelagið rinda kostnaðin fyri stovnanina, skal hetta síggjast í stovningar-skjalinum.

Í hesum sambandi eiga stovnararnir tó at meta um, hvørt tað er ráðiligt at lata felagið rinda stovningarkostnaðin. Tað er ábyrgdin hjá stovnarunum at tryggja, at íverksetarafelagið verður stovnað við fullgóðum kapitali. Eftir stovnanina hevur leiðslan ábyrgdina av at tryggja, at kapitaltilbúgvingin hjá felagnum til eina og hvørja tíð er fullgóð.

Verður eitt íverksetarafelag stovnað, har stovningarkostnaðurin er meira enn helvtin av felagskapitalinum, eiga stovnararnir at umhugsa at rinda kostnaðin sjálvir, ella at veita eitt lán til felagið til tess at rinda kostnaðin.

Í hesum sambandi mugu stovnararnir gera eina meting av, hvørt talan er um nóg mikið av felagskapitali.

Samstundis skal gerast vart við ásetingina í Vinnufelagalógini um kapitaltap, har leiðslan er áløgd ávísar skyldur, um tað verður staðfest, at eginogn felagsins er minni enn helvtin av teknaða kapitalinum.

**Áseting um kapitaltap**

Um eginognin hjá einum kapitalfelag er minni enn helvtin av teknaða kapitalinum, skal hetta viðgerast á einum aðalfundi.

Ásetingin í Vinnufelagalógini um kapitaltap, er bæði galdandi tá tapið verður staðfest í sambandi við at ársfrásøgnin verður gjørd og tá felagið verður fyri knappligari fíggjarligari afturgongd í roknskaparárinum. T.v.s. at tað kann vera við stovnanina ella seinni í lívi felagsins.

Ásetingin um kapitaltap ber við sær, at leiðslan í einum kapitalfelag, undir hesum eitt íverksetarafelag, skal tryggja, at aðalafundur verður hildin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir at tað er staðfest, at eginogn felagsins er minni enn helvtin av teknaða kapitalinum.

Høvuðsleiðslan, tvs. stjórnin í einum felag, sum bert hevur eina stjórn, skal á aðalfundinum greiða frá fíggjarligu støðuni hjá felagnum. Harumframt skal høvuðsleiðslan, um neyðugt, seta fram uppskot um, hvørji átøk skulu setast í verk. Tað kann til dømis vera uppskot um at veita felagnum nýggjan pening ella at upploysa felagið.

### 4.1.2 Hvørjar upplýsingar skulu bert vera í stovningarskjalinum undir ávísum umstøðum?

Um stovnararnir hava tikið avgerð um fylgjandi viðurskifti, skulu tey eisini verða nevnd í stovningarskjalinum:

- At stovnarar ella onnur skulu fáa serlig rættindi ella fyrimunir.
- At avtala er gjørd við ein stovnara ella annan persón, sum kann hava við sær, at íverksetarafelagið kann átaka sær týðandi fíggjarligar skyldur.
  Dømi: Avtala er gjørd um at íverksetarafelagið skal leiga eitt virki, sum ein stovnari eigur.
- At ársfrásøgnin hjá íverksetarafelagnum ikki skal verða grannskoðað. Sí nærri um frával av grannskoðan undir punkti 14.2.1 í hesi vegleiðing.

### 4.2 Viðtøkurnar hjá íverksetarafelagnum

Viðtøkur verða ofta lýstar sum grundlógin hjá felagnum, tí tær eru grundarlagið undir felagnum og virkseminum hjá tí.

Viðtøkurnar kunnu vera stuttar og bert innihalda tær upplýsingar, sum Vinnufelagalógin krevur. Tær kunnu eisini vera meira drúgvar og skipa viðurskifti har lógin ásetur karmar, men samstundis gevur møguleika fyri tillagingum, t.d. ásetan av strangari avgerðarkrøvum.

Viðtøkurnar kunnu eisini skipa viðurskifti, sum ikki eru skipaði í lógini yvirhøvur, t.d. áseta hvussu ein ósemja millum íverksetarapartahavarnar skal handfarast.

Vavið á viðtøkunum og ásetingunum í teimum er ofta treytað av støddini á felagnum og talinum av eigarum. Sjálvt í feløgum við fáum eigarum verður mælt til frammanundan at avgera, hvussu møguligar ósemjur millum eigararnar skulu handfarast. Tað kann annaðhvørt gerast í viðtøkum felagsins ella í eini eigaravatalu.

Viðtøkurnar eru bindandi fyri allar eigararnar av felagnum. Viðtøkurnar eru eisini galdandi fyri persónar, sum seinni yvirtaka íverksetarapartar í felagnum.

Viðtøkurnar skulu latast inn til Skráseting Føroya í sambandi við, at íverksetarafelagið verður fráboðað til skrásetingar hjá Skráseting Føroya. Viðtøkurnar eru eftir hetta alment atkomuligar hjá Skráseting Føroya

Til ber at bíleggja avrit av viðtøkunum hjá Skráseting Føroya. Kostnaðurin fyri útflýggjanina er 200 kr.

Til ber at lesa nærri um stovnanina av einum nýggjum felagi undir punkti 16 í hesi vegleiðing.

### 4.2.1 Minsta krav til innihald í viðtøkunum

Tær upplýsingar, sum altíð skulu framganga av viðtøkunum, eru:

- Navnið á íverksetarafelagnum.
- Endamálið hjá íverksetarafelagnum.
- Støddin á íverksetarakapitalinum. Les meira um hetta undir punkti 7 í hesi vegleiðing.
- Býtið av felagskapitalinum, annaðhvørt upplýst sum talið av íverksetarapørtum ella áljóðandi virði á íverksetarapørtunum.
- Rættindi, ið eru knýtt at einum íverksetaraparti

- Upplýsingar um leiðslustovnar, undir hesum upplýsingar um leiðslubygnað, hjá kapitalfelagnum.
- Upplýsingar um, hvussu kallað verður inn til aðalfundar.
- Roknskaparárið hjá íverksetarafelagnum. Viðtøkurnar skulu innihalda upplýsing um fyrsta roknskaparár felagsins umframt tað fasta roknskaparárið. Sí nærri um roknskaparár undir punkti 14.1 í hesi vegleiðing.

#### 4.2.1.1 Upplýsingar um rættindi, sum eru knýtt at íverksetarapartinum

Tað skal vera gjørligt at lesa í viðtøkunum, hvørji rættindi og møguligar skyldur man hevur sum íverksetarapartahavi í felagnum.

Typisk rættindi eru:

- Atkvøðurættur á aðalfundinum.
- Rættur til at vera umboðaður á aðalfundinum (umboðanarrættur).
- Rættur til at útnevna leiðslulimir.
- Rættur til vinningsbýti. Sí um vinningsbýti undir punkti 7.2.4 til hesa vegleiðing.

### 4.3 Eigarabókin hjá íverksetarafelagnum

Høvuðsleiðslan, t.e. stjórnin í feløgum, sum einans hava stjórn, skal skjótast gjørligt eftir at felagið er stovnað, gera eitt yvirlit yvir allar eigararnar í felagnum. Talan er um ta sokallaðu eigarabókina.

Viðtøkurnar kunnu áseta, at eigarabókin verður førd vegna felagið av einum persóni, sum er valdur av felagnum.

Eigarabókin skal innihalda upplýsingar um:

- allar íverksetarapartahavaranar og møguligar veðhavarar,
- dagfesting fyri útvegan, avhendan ella møguliga veðseting av íverksetarapartinum,
- stødd á íverksetarapartinum,
- tey atkvøðurættindi, sum eru knýtt at íverksetarapørtunum, og
- íverksetarapartahavans ella veðhavans navn og bústað, og, tá tað snýr seg um fyritøkur, navn, skrásetingarnummar og heimstað. Er talan um útlendskan likamligan ella løgfrøðiligan persón ella veðhava, skal onnur skjalváttan leggjast við, ið tryggjar eintýdda eyðmerking av íversetarapartahavanum ella veðhavanum.

Fyri at tryggja at at innihaldið í eigarabókini er dagført, skal hvør nýggjur íverksetaraparthavari upplýsa fyri felagnum um eigaraskifti ella veðseting. Innseting í eigarabókina av nýggium eigarum og panthavarum skal dagfestast.

Eigarabókin skal vera atkomulig fyri allar parthavarar.

## 5. Navnið á íverksetarafelagnum

Tað eru einans íverksetarafeløg, sum í navni sínum kunnu brúka “íverksetarafelag” ella styttingina “ÍVF”.

Tá ið navn verður valt til felagið, eigur ein at hugsa um:

- um navnið kann skrásetast,
- hvørt navnið er lógligt, og
- um navnið kann gera seg inn á rættindi hjá øðrum.

Rætturin til eitt navn er skipaður í Vinnufelagalógini, marknaðarføringslógini, vørumerkjalógini, fíggjarlóggávuni og aðrari serlóggávu.

### 5.1 Hvørjar avmarkingar eru í valinum av navni?

Navnið hjá íverksetarafelagnum skal týðiliga líkjast frá øðrum felagsnøvnum, sum eru skrásett hjá Skráseting Føroya. Í navninum má heldur ikki vera ættarnavn, vørumerki, handilssermerki o.tíl. hjá øðrum, sum felagið ikki hevur rætt til.

Navnið hjá einum íverksetarafelagi má heldur ikki vera villleiðandi. Tað er ikki lógligt, at felagsnavnið vísir til eitt ávíst virksemi, um felagið ikki fæst við tílíkt virksemi. Tískil skal íverksetarafelagið broyta navn sítt, um navnið vísir til ávíst virkemi, og høvuðsvirksemi hjá felagnum broytist munandi.

#### 5.1.1 Kann ynskta navnið kannast frammanundan?

Stovnari og fráboðari eiga at kanna um valda felagsnavnið kann skrásetast hjá Skráseting Føroya. Tað gerst við at gera eina leiting á www.skraseting.fo

Um onki navn er samlíkt í skipanini hjá Skráseting Føroya, kann felagið skrásetast eftir vinnufelagalóggávuni.

Skráseting Føroya avgerð ikki, hvørt eitt navn ger seg inn á verandi rættindi. Tílíkar ósemjur mugu um neyðugt leggjast fyri dómstólarnar.

### 5.2 Hjánøvn

Íverksetarafeløg kunnu nýta hjánøvn sum ískoyti til høvuðsnavnið hjá felagnum.

## 6. Endamál íverksetarafelagsins

Viðtøkurnar skulu innihalda upplýsingar um endamálið hjá felagnum. Tvs. Hvat slag av virksemi íverksetarafelagið skal reka. Endamálsásetingin skal vísa hvat felagið veruliga tekst við, tvs. at tað skal vera avmarkað.

Endamálsorðingin má ikki vera ov breið, men skal rímiliga beinrakið nevna tað virksemið, sum felagið fæst við. Tað kann t.d. vera at reka handil við súkklum, menning av ritbúnaði, handverksvirksemi o.tíl. Hinvegin er ein upplýsing um, at felagið “rekur vinnuvirksemi”, ein ov breið endamálsorðing.

## 7. Kapitalkravið

Eitt íverksetarafelag kann vera stovnað við einum felagskapitali millum 1 kr. og 49.999 kr. Stovnanin kann einans vera kontant, og felagskapitalurin skal gerast upp í donskum krónum ella evrum.

Fyri at kunna skráseta eitt nýstovnað íverksetarafelag, skal ein kontantur felagskapitalur vera í felagnum, sum svarar til ta upphædd, sum framgongur á stovningarskjalinum.

Eitt felag, ið verður stovnað við 50.000 kr. ella meira, kann ikki vera eitt íverksetarafelag. Um eitt íverksetarafelag verður fráboðað við einum felagskapitali á 50.000 kr. ella meira, verður skrásetingin noktað.

Eitt skrásett íverksetarafelag er ein sjálvstøðug rættareind við sjálvstøðugum rættar- og virkisføri. Hetta merkir, at heftingin hjá íverksetarapartahavaranum fyri skuldina hjá felagnum er avmarkað til tey virðir í felagnum, sum viðkomandi eigur ein part av, orsakað av sínum eigaraluti í felagnum.

Leiðslan hjá felagnum skal syrgja fyri, at kapitalurin hjá felagnum hevur eina fullgóða støðd sæð í mun til raksturin av felagnum. Hetta merkir, at felagið skal vera ført fyri at røkja sínar verandi og komandi fíggjarligu skyldur, so hvørt sum tær fella til gjaldingar. Tú kanst lesa meira um fullgóða kapitaltilbúgving undir punkti 7.3.

### 7.1 Felagskapitalurin

Felagskapitalurin verður innskotin av íverksetarapartahavunum. Afturfyri hetta fáa teir íverksetara-partar, sum svara til tann partin av felagskapitalinum, teir hava inngoldið.

Støddin á felagskapitalinum skal standa í viðtøkunum og skal skrásetast hjá Skráseting Føroya. Tá kapitalurin er inngoldin, eigur felagið kapitalin.

### 7.2 Inngjald av felagskapitali

Felagskapitalurin skal verða inngoldin í seinasta lagi áðrenn fráboðanina til Skráseting Føroya, t.d. á eina bankakonto hjá felagnum. Kapitalurin kann einans verða inngoldin kontant.

Til at skjalprógva, at felagskapitalurin í einum íverksetarafelag er inngoldin, kunnu stovnararnir undirskriva eina egin-váttan.
Tað eru bert íverksetarafeløg, sum verða stovnað við einum felagskapitali á 25.000 kr. ella minni, sum kunnu prógva kapitalin við at nýta egin-váttan.

#### 7.2.1 Partvíst inngjald av felagskapitali

Tað ber ikki til at inngjalda ein part av kapitalinum, í sambandi við stovnanina av einum íverksetarafelagið, orsakað av, at ásetingin í Vinnufelagalógini um partvíst inngjald inniheldur eitt minstamark á 50.000 kr.

#### 7.2.2 Inngjald av felagskapitali við øðrum virðum enn kontantum (apportinnskot)

Í einum íverksetarafelagi kann felagskapitalurin einans verða skotin inn í kontantum. Hetta merkir, at kapitalurin ikki kann verða inngoldin við øðrum virðum enn reiðum peningi (apportinnskoti).

### 7.2.3 Samansparing av yvirskoti

Í mun til vanlig smápartafeløg, hava íverksetarafeløg skyldu til á hvørjum ári at seta 25 prosent av møguligum yvirskoti hjá felagnum til bundnan tiltakspening.
Hesin tiltakspeningur skal vera við til at uppbyggja kapitalgrundarlagið hjá íverksetarafelagnum.
Eitt íverksetarafelag skal seta minst 25 prosent av yvirskotinum av til bundnan tiltakspening, til hesin tiltakspeningur saman við felagskapitalinum í minsta lagi er 50.000 kr.

Eitt íverksetarafelag hevur møguleika til sjálvboðið at leggja av ein størri part av yvirskotinum.

### 7.2.4 Vinningsbýti

Eitt íverksetarafelag kann ikki luta út vinningsbýti, undir hesum serligt vinningsbýti, fyrr enn tiltakspeningurin saman við felagskapitalinum í minsta lagi er 50.000 kr.

## 7.3 Fullgóð kapitaltilbúgving

Kravið um, at eitt íverksetarafelag skal hava ein felagskapital, sum er millum 1. kr. og 49.999 kr. er eitt minsta krav í sambandi við skrásetingina av felagnum. Leiðsla felagsins skal harumframt syrgja fyri, at kapitaltilbúgvingin hjá felagnum til eina og hvørja tíð er fullgóð.

Ein fullgóð kapitaltilbúgving merkir m.a., at felagið hevur nóg mikið av kapitali í mun til raksturin av felagnum, og at felagið er ført fyri at rinda bæði verandi og komandi rokningar. Støddin á neyðugu kapitaltilbúgvingini er treytað av ítøkiligu viðurskiftunum í tí einstaka felagnum.

**Fullgóð kapitaltilbúgving**
Tað er uppgávan hjá leiðsluni at tryggja at kapitaltilbúgving felagsins altíð er fullgóð. Leiðslan skal støðugt kunna seg um og taka støðu til fíggjarligu, undir hesum gjaldføris-, støðuna hjá felagnum og í tí sambandi taka støðu til, um støðan er fíggjarliga forsvarlig.
Leiðslan kann eftir umstøðunum koma undir endurgjaldsábyrgd mótvegis íverksetarafelagnum, íverksetarapartahavunum, kreditorunum hjá felagnum og øðrum.

Ikki bert felagskapitalurin skal takast uppí metingini av kapitaltilbúgving felagsins.
Kapitaltilbúgvingin er allur tøkur tiltakspeningur, eitt íverksetarafelag hevur – tvs. verandi felagskapitalur, burturleggingar og møgulig fremmand fígging.

Ábyrgdin hjá leiðsluni fyri at tryggja fullgóða kapitaltilbúgving merkir, at leiðslan hevur rætt og skyldu til at arbeiða fyri at fáa kapital til felag, sum er í fíggjarligari kreppu, um leiðslan metir at felagsins framhaldandi rakstur skal vera fíggjarliga ráðiligur og ikki enda við fíggjarligum missi fyri felagið.

Um ein framtíðar ráðiligur rakstur verður mettur at vera óforsvarligur, hevur leiðsla felagsins skyldu at steðga rakstrinum av felagnum fyri at forða fyri, at starvsfólk og felagsins samstarvspartar og onnur ikki vera fyri missi.

Um leiðslan ikki heldur skylduna um at tryggja fullgóða kapitaltilbúgving, kann hon koma undir

endurgjaldsábyrgd mótvegis íverksetarafelagnum, íverksetarapartahavunum, kreditorunum hjá felagnum og øðrum.

## 8. Íverksetarapartar

Í íverksetarafeløgum verða íverksetarapartar givnir út í sambandi við inngjaldingina av felags-kapitalinum.

Áðrenn stovningarskjal og viðtøkur verða gjørdar, eigur støða at vera tikin til ymisk viðurskifti, sum hava við íverksetarapartarnar hjá felagnum at gera.

Ávís rættindi fylgja ognarrættinum til íverksetarapartarnar. Skilt verður ímillum fyrisitingarlig og fíggjarlig rættindi.

### 8.1 Fyrisitingarlig og fíggjarlig rættindi

Tey fyrisitingarligu rættindini fevna m.a. um rættin at møta og taka orðið á aðalfundinum, og til at atkvøða, í tann mun íverksetarapartarnir hava atkvøðurætt.

Tey fíggjarligu rættindini fevna m.a. um rættin til at móttaka vinningsbýti.

### 8.2 Navna-íverksetarapartur

Íverksetarapartar skulu gevast út við navni.

Ein eigari av navna-íverksetarapørtum kann einans gera sær dælt av teimum fyrisitingarligu rættindunum, um hann er skrivaður upp í eigarabókina, ella hevur fráboðað og skjalprógvað ognar-rætt sín á annan hátt. Rætturin til vinningsbýti og onnur útgjøld og rætturin til nýggjar íverksetara-partar við kapitalhækkan, kann altíð gagnnýtast.

Íverksetarapartar eru frítt umsetiligir og ikki innloysiligir. Um felagið hevur givið út navna-íverksetarapartar, kunnu viðtøkurnar áseta avmarkingar í umsetiligheit ella viðvíkjandi útloysn av íverksetarapørtunum.

### 8.3 Tekning av íverksetarapørtum

Íverksetarapartar verða útgivnir í sambandi við, at tey, ið ynskja at gerast íverksetarapartahavar í felagnum, “tekna” seg fyri ta ynsktu nøgdina av íverksetarapørtum.

Tann, ið teknar seg fyri eina nøgd av íverksetarapørtum, bindir seg til at keypa íverksetarapartar við støði í tekningarkursinum í stovningarskjalinum, upplýsingunum í viðtøkunum um støddina á felagskapitalinum og talinum av ella áljóðandi virðinum á íverksetarapørtunum.

Eitt íverksetarafelag kann ikki bjóða íverksetarapartar til almenningin. Tekningin fer sostatt fram í einum skara av persónum ella fyritøkum, sum kenna hvønn annan frammanundan.

## 9. Leiðslustovnar og valmøguleikar

Møguleiki er at velja millum ymiskar samansetingar av leiðslustovnum til eitt íverksetarafelag.

Henda vegleiðing tekur støði í, at ein leiðslubygnaður við bert einari stjórn verður valdur.

Í íverksetarafeløgum, sum einans hava eina stjórn, er stjórnin bæði evsta leiðslan, sum stendur fyri yvirskipaðu og strategisku leiðsluni, og høvuðsleiðslan, sum stendur fyri dagligu leiðsluni.

## 10.Stjórnin og uppgávurnar hjá stjórnini

Í leiðsluni hjá felagnum kunnu vera ein ella fleiri stjórar.

Hevur íverksetarafelagið fleiri stjórar, eru teir felags um at røkja leiðsluuppgávurnar í felagnum.

Í feløgum, sum bert hava ein stjóra í leiðsluni, er tað stjórin, ið hevur ta yvirskipaðu og strategisku umframt dagligu leiðsluna um hendi. Tað merkir, at stjórin kann virka í øllum leiðsluviðurskiftum hjá felagnum. Stjórin eigur tó at spyrja eigararnar, tá avgerðir um óvanlig ella stór mál skulu takast.

Stjórin verður bæði valdur og uppsagdur av aðalfundinum.

Ein stjóri kann altíð velja at fara úr stjórnini. Felagið skal í hesum føri syrgja fyri, at ein nýggjur stjóri verður valdur, og at tey nýggju viðurskiftini verða skrásett hjá Skráseting Føroya. Tað skal skjótast gjørligt vera kallað inn til eykaaðalfund, har nýggjur stjóri skal veljast.

Uppgávurnar hjá stjóranum eru at tryggja:

- At bókførslan hjá felagnum er í samsvar við lóggávuna. Stjórin hevur ábyrgdina av, at bókførslan fer fram á tryggan hátt og í samsvari við bókhaldsskylduna.
- At umsiting av ognum felagsins fer fram á tryggan hátt.
- At kapitaltilbúgvingin hjá felagnum til eina og hvørja tíð er fullgóð, undir hesum at nóg mikið av gjaldføri er til at nøkta verandi og komandi skyldur kapitalfelagsins, so hvørt sum tær fella til gjaldingar.

Stjórin hevur til eina og hvørja tíð skyldu til at meta um fíggjarligu støðuna og tryggja, at kapitaltilbúgving felagsins er fullgóð. Stjórin skal sostatt leypandi taka støðu til fíggjarligu støðuna, undir hesum gjaldførið, hjá felagnum og í hesum sambandi meta um, hvørt støðan er fíggjarliga forsvarlig.

Ein stjóri kann koma undir endurgjaldsábyrgd, um hann ikki steðgar rakstrinum av felagnum, um so er at ongi útlit eru fyri fullgóðum rakstri í framtíðini ella framhaldandi rakstur førir til fíggjarligt tap.

## 11. Val av stjórnarlimum

Stjórnin verður vald á aðalfundinum. Stjórnin skal vera sett saman av einum ella fleiri stjórum. Stjórar skulu vera myndugir persónar og mugu ikki vera undir verjumáli.

Í sambandi við stovnanina er vanligt at stovnararnir avgera hvør skal vera í stjórnini hjá felagnum fram til fyrsta vanliga aðalfundin. Í tílíkum føri skal stjórin verða nevndur í stovningarskjalinum.

Teir av aðalfundinum valdu stjórar verða valdir fyri tað valskeið, sum er ásett í viðtøkunum hjá felagnum.

## 12. Fundarbók og grannskoðanarprotokoll

Stjórin skal føra eina fundarbók. Í feløgum, hvørs ársfrásøgn sambært viðkomandi lóggávu skal verða grannskoðað, skal tann valdi grannskoðarin føra eina grannskoðanarprotokoll.

### 12.1 Fundarbók

Er meira enn ein limur í stjórnini, skal stjórnin føra eina fundarbók yvir samráðingarnar. Allir luttakandi leiðslulimir skulu undirskriva fundarbókina.

### 12.2 Grannskoðanarprotokoll

Um ársfrásøgnin hjá felagnum verður grannskoðað, skal grannskoðarin føra eina grannskoðanar-protokoll.

Grannskoðanarprotokollin er eitt amboð hjá grannskoðanini at nýta til samskifti við leiðsluna hjá felagnum. Kravið um eina grannskoðanarprotokoll er einans galdandi, um íverksetarafelagið sambært lóggávuni hevur grannskoðanarskyldu.

Stjórin skal seta sína undirskrift á grannskoðanarprotokollina. Tað sama er galdandi, um grannskoðari annars grundað á avtalu við felagið førir eina grannskoðanarprotokoll.

Hevur felagið fleiri stjórar, skulu allir stjórarnir seta sína undirskrift á grannskoðanarprotokollina. Stjórar, sum ikki eru til staðar, skulu skriva undir eftirfylgjandi.

Sí nærri um roknskaparár, ársfrásøgn og grannskoðan, undir hesum eisini frával av grannskoðan, undir punkti 14.

## 13. Umboðanar- og tekningarrættur

Allir limirnir í stjórnini hava rætt til at umboða íverksetarafelagið mótvegis umheiminum – teir hava ‘umboðanarrætt’. Hetta merkir m.a., at tann einstaki stjórin hevur rætt til at stevna øðrum vegna felagið og at møta í rættinum vegna felagið.

Rætturin at binda felagið við at gera avtalur vegna felagið verður avgjørdur av tekningarrættinum. Tekningarrætturin hjá felagnum ásetur hvør kann gera eina avtalu, sum bindur felagið.

Í einum íverksetarafelag, sum bert hevur eina stjórn, hevur samlaða leiðslan altíð rætt at tekna felagið við at gera avtalur felagsins vegna.

Sambært Vinnufelagalógini kann hvør einstakur limur í stjórnini binda felagið við at gera avtalur vegna felagið. Rætturin til at binda felagið verður nevndur ‘tekningarrættur’.

Tó kann ásetast í viðtøkurnar, at tekningarrætturin hjá einstaka stjórnarliminum skal vera avmarkaður, soleiðis at tekningarrætturin kann útinnast antin:

- Av fleiri stjórnarlimum í felag, ella
- Av einum ella fleiri ávísum limum hvør sær ella í felag.

Tekningarrætturin kann ikki vera avmarkaður á annan hátt.

Einans leiðslulimir hjá felagnum hava tekningarrætt.

Afturat tekningarreglunum kann ein persónur bert binda felagið, um hann virkar í tráð við sína støðufulltrú, sambært § 10, stk. 2 í avtalulógini. Hetta merkir, at persónurin kann binda felagið, um starvið hjá persóninum, sambært lóg ella siðvenju, gevur honum rætt til at virka vegna felagið í tí ávísa samanhanginum.

## 14. Roknskaparár, ársfrásøgn og grannskoðan

Ársroknskaparlógin ásetur, hvørji virkir skulu leggja fram ársfrásøgn eftir ásetingunum í lógini.

Íverksetarafeløg eru fevnd av ársroknskaparlógini, og skulu árliga lata inn eina ársfrásøgn til Skráseting Føroya í seinasta lagi 6 mánaðir eftir lokið roknskaparár.

### 14.1 Roknskaparár

Roknskaparárið hjá íverksetarafelagnum skal ásetast í viðtøkunum hjá felagnum. Hetta skal vera upplýst sum leypandi ár uttan árstal, t.d. 1/1-31/12 ella 1/7 -30/6. Tað fasta roknskaparárið skal vera 12 mánaðir.

Tað er ein møguleiki at nevna fyrsta roknskaparskeið í viðtøkunum, men hetta er ikki eitt krav. Fyrsta roknskaparskeið kann vara eitt styttri ella longri tíðarskeið enn 12 mánaðir, men kann í mesta lagi vara 18 mánaðir.

Fyrsta roknskaparárið hjá felagnum byrjar tá felagið verður stovnað, t.e. tá stovningarskjalið er undirskrivað, ella dagurin, ið verður nevndur í stovningarskjalinum. Er fasta roknskaparárið hjá felagnum álmanakkaárið, rennur fyrsta roknskaparskeið frá stovningardegnum fram til ársenda, um tað ikki er ásett í viðtøkunum, at fyrsta roknskaparskeið skal vara longur. Um stovningarskjalið er dagfest 15. mars 2017, er fyrsta roknskaparár felagsins tí frá 15. mars 2017 til 31. desember 2017, um álmanakkaárið er valt sum fast roknskaparár.

Er íverksetarafelagið stovnað við virknaði fram í tíð, byrjar fyrsta roknskaparskeiðið tann dagin sum felagið skal hava virknað frá. Tað merkir, at fyri eitt felag sum er stovnað 15. mars 2017, men tað er við stovnanina avgjørt at felagið ikki skal hava virknað fyrr enn 1. mai 2017, fer fyrsta roknskaparskeið ikki at byrja fyrr enn 1. mai 2017 og til 31. desember 2017, um álmanakkaárið er valt sum fast roknskaparár.

Tað er ikki møguligt at stovna eitt íverksetarafelag við roknskaparligum virknaði áðrenn stovningardagin, tí felagið bert kann stovnast við kontantum inngjaldi.

**14.2 Gerð av ársfrásøgn**
Evsta leiðsla felagsins hevur ábyrgdina av, at ein ársfrásøgn verður gjørd sambært ársroknskaparlógini.

Smærri feløg skulu fylgja ásetingunum um ársfrásøgn, sum eru galdandi fyri roknskaparflokk B.

Smærri feløg eru feløg, sum í tvey fylgjandi roknskaparár á fíggjarjavnadegnum ikki fara upp um tvey av trimum av fylgjandi støddarmørkum:

1. Ein fíggjarjavna upp á 36 mió. Kr.,
2. Eina nettosølu upp á 72 mió. kr. og
3. miðaltal gjøgnum roknskaparárið av heiltíðarsettum starvsfólkum upp á 50.

Meginreglan er, at eitt íverksetarafelag, ið hevur skyldu til at lata inn ársfrásøgn, eisini skal lata sín ársroknskap grannskoða. Grannskoðanin skal verða framd av einum løggildum ella skrásettum grannskoðara.

Eitt íverksetarafelag, fevnt av roknskaparflokki B, hevur eisini hesar møguleikar:

- At lata vera við at lata ársoknskapin grannskoða. Sí nærri undir punkti 14.2.1.
- Einfaldari grannskoðan av ársroknskapinum eftir váttanarstandardi fyri smærri fyritøkur. Sí nærri undir punkti 14.2.2.

Ársfrásøgnin skal góðkennast av aðalfundinum og sendast til Skráseting Føroya. Hetta er galdandi, óansæð um íverksetarafelagið hevur frávalt grannskoðan ella hevur valt einfaldari grannskoðan eftir váttanarstandardinum.

Í sambandi við roknskaparframløguna skal leiðslan gera eina *leiðsluátekning*, har leiðslan váttar at ársfrásøgnin er í løgd fram í samsvari við lóggávuna, roknskaparstandardir, krøv í viðtøkunum, og um roknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum, fíggjarstøðu og úrsliti.

Í sambandi við leiðsluátekningina skal leiðslan upplýsa, um aðalfundurin hevur tikið avgerð um at frávelja grannskoðan fyri komandi roknskaparár. Um hetta ikki sæst í leiðsluátekningini, kann felagið ikki gera galdandi at grannskoðan er frávald.

**14.2.1 Frával av grannskoðan**
Sambært ársroknskaparlógini skulu ársroknskapir hjá íverksetarafeløgum sum útgangsstøði verða grannskoðaðir.

Um eitt íverksetarafelag velur grannskoðan frá, merkir hetta, at ársroknskapurin hjá felagnum ikki skal vera grannskoðaður av einum góðkendum grannskoðara, uttan so at felagið sjálvt tekur avgerð um tað.

Uttan mun til um felagið hevur valt grannskoðan frá, hevur evsta leiðsla felagsins framvegis skyldu at gera eina ársfrásøgn, sum skal góðkennast av aðalfundinum og sendast inn til Skráseting Føroya.

Treytirnar fyri at kunna velja grannskoðan frá eru, at felagið í tvey fylgjandi roknskaparár ikki fer upp um tvey av fylgjandi støddarmørkum á fíggjarjavnadegnum:

1) Ein fíggjarjavna á 1 mió. kr.,
2) Eina nettosølu á 2 mió. kr. og
3) Eitt miðaltal gjøgnum roknskaparárið av heiltíðarsettum starvsfólkum á 12.

Um stovnararnir meta, at felagið ikki fer upp um júst nevndu støddarmørk, kunnu stovnararnir áseta í stovningarskjalinum, at ársfrásøgnin ikki skal verða grannskoðað tað fyrsta árið. Galdandi støddarmørk eru ásett í § 135 í ÁRL.

Eftir stovnanina av felagnum, er tað aðalfundurin, sum tekur støðu til møguligt frával av grannskoðan. Avgerðin um frával av grannskoðan kann einans takast á **vanliga** aðalfundinum. Avgerð um tilval av grannskoðan kann bæði verða tikin á vanliga aðalfundinum og á eykaaðalfundi.

Haldfeløg eru feløg, ið hava týðandi kapitalpartar í øðrum fyritøkum, og sum hava týðandi ávirkan á rakstrarligu ella fíggjarligu leiðsluna í einum ella fleiri av hesum fyritøkum.

Smærri haldfeløg hava møguleika at velja grannskoðan frá, um haldfelagið og tær fyritøkur, sum felagið hevur týðandi ávirkan á, tilsamans í tvey fylgjandi roknskaparár ikki fer upp um tvey av fylgjandi trimum støddarmørkum fíggjarjavnadagin:

1) Ein fíggjarjavna á 1 mió. kr.,
2) Eina nettosølu á 2 mió. kr. og
3) Eitt miðaltal gjøgnum roknskaparárið av heiltíðarsettum starvsfólkum á 12.

Øll feløg hava skyldu at lata ársfrásøgn, sum er góðkend av aðalfundinum, inn til Skráseting Føroya.

Hetta er eisini galdandi fyri feløg, ið hava valt grannskoðan frá.

### 14.2.2 Váttanarstandardur

Eitt íverksetarafelag, sum er fevnt av roknskaparflokki B, kann velja at lata grannskoðanina verða framda eftir váttanarstandardinum[1], um felagið fíggjarjavnadagin í tvey fylgjandi roknskaparár ikki fer upp um tvey av fylgjandi støddarmørkum:

1) Ein fíggjarjavna á 12 mió. kr.,
2) Eina nettosølu á 24 mió. kr., og
3) Miðaltal gjøgnum roknskaparárið av heiltíðarsettum starvsfólkum á 15.

Tá ið váttanarstandardurin verður nýttur, merkir tað, at framd verður ein sokallað "víðkað gjøgnumgongd" av ársroknskapinum í staðin fyri eina fulla grannskoðan. Váttanarstandardurin er tillagaður viðurskiftini í smærri fyritøkum.

---

1 Váttanarstandardurin framgongur av skjali 1 til kunngerð nr. 153 frá 23. desember 2016 um grannskoðaraváttanir o.tíl.

Váttanarstandardurin skal tryggja, at tey viðurskifti, sum eru viðkomandi í smærri fyritøkum, verða eftirkannað, men at tað slepst undan eftirkanningum, sum ikki eru neyðugar. Um váttanarstandardurin verður valdur, hevur grannskoðarin ikki skyldu at føra eina grannskoðanarprotokoll.

Um váttanarstandardurin skal nýtast í sambandi við fyrstu ársfrásøgnina hjá felagnum, mugu stovnararnir taka støðu til tað í **stovningarskjalinum.**

Eftir stovnanina er tað aðalfundurin, sum tekur avgerð um møguliga nýtslu av váttanarstandardinum. Avgerðin um nýtslu av váttanarstandardinum kann einans verða tikin á **vanliga** aðalfundinum. Avgerð um tilval av grannskoðan eftir grannskoðanarstandardinum, kann bæði verða tikin á vanliga aðalfundinum og á eykaaðalfundi.

Avgerðin krevur ikki viðtøkubroyting og skal ikki verða upplýst í ársroknskapinum. Hinvegin skal avgerðin framganga av aðalfundarbókini.

Smærri haldfeløg kunnu velja at nýta váttanarstandardin, um haldfelagið og tær fyritøkur, sum felagið eigur kapitalpartar í og hevur týðandi ávirkan á, tilsamans fíggjarjavnadagin í tvey fylgjandi roknskaparár ikki fer upp um tvey av fylgjandi støddarmørkum:

1) Ein fíggjarjavna á 12 mió. kr.,
2) Eina nettosølu á 24 mió. kr., og
3) Miðaltal gjøgnum roknskaparárið av heiltíðarsettum starvsfólkum á 15.

### 14.3 Krav til grannskoðara í sambandi við grannskoðanarskyldu og sjálvbodna grannskoðan

Eitt íverksetarafelag, sum lýkur krøvini til at velja grannskoðan frá, kann kortini gera av at lata sín ársroknskap grannskoða. Tá er talan um sokallaða sjálvbodna grannskoðan.

Óansæð um talan er um grannskoðanarskyldu ella sjálvbodna grannskoðan, kunnu einans løggildir ella skrásettir grannskoðarar, ið eru knýttir at løggildum ella skrásettum grannskoðanarvirkjum, grannskoða ársroknskapirnar.

#### 14.3.1 Val av grannskoðara

Møguligur grannskoðari skal veljast av stovnarunum í sambandi við stovnanina. Grannskoðari verður valdur fyri eitt nærri ásett tíðarskeið, t.d. fram til næsta vanliga aðalfund.

Til árliga vanliga aðalfundin skulu íverksetarapartahavarnir góðkenna ársroknskapin hjá felagnum, eins og aðalfundurin skal taka støðu til, um grannskoðari skal afturveljast ella nýggjur grannskoðari skal veljast fyri komandi roknskaparár.

#### 14.3.2 Frásetan av grannskoðara

Grannskoðari kann verða settur frá av tí, sum hevur valt grannskoðaran, tvs. í útgangsstøðu aðalfundurin.

Um ein grannskoðari fer frá áðrenn lokna starvstíð, skal grannskoðarin skjótast til ber boða

Skráseting Føroya frá hesum. Við fráboðanini skal fylgja nøktandi frágreiðing um orsøkina fyri, at starvið er endað. Skjótast gjørligt eftir hetta, skal kallast inn til eykaaðalfund at velja nýggjan grannskoðara.

**14.4 Uppgávurnar hjá valda grannskoðaranum**
Valdi grannskoðarin skal grannskoða ársfrásøgnina hjá felagnum.

Grannskoðarin skal eisini ansa eftir, at evsta leiðsla felagsins lýkur skyldur sínar at gera og føra bøkur, yvirlit og protokollir.

Grannskoðari skal harumframt ansa eftir, at reglurnar um at leggja fram og at skriva undir grannskoðanarprotokollina eru hildnar.

Í einum felagi, ið kemur undir grannskoðan, kann aðalfundurin áleggja grannskoðara at gera eyka grannskoðanararbeiði ella kanningar. Aðalfundurin kann hinvegin ikki avmarka grannskoðanina hjá grannskoðaranum av felagnum í mun til tað, sum er kravt sambært lógini.

Grannskoðari kann hjálpa til við øðrum uppgávum, so leingi tað ikki ávirkar óheftni hjá grannskoðaranum.

**14.5 Revsitiltøk í sambandi við vantandi grannskoðara**
Um eitt íverksetarafelag ikki hevur fráboðað ein grannskoðara til Skráseting Føroya, og felagið antin er fevnt av grannskoðanarskyldu ella sjálvbodnari grannskoðan, hevur Skráseting Føroya heimild til at *tvingsilsavtaka* felagið ella at áleggja leiðslulimunum *dag- ella vikubót.*

## 15. Ábyrgd
Eitt íverksetarafelag hevur avmarkaða ábyrgd. Hetta merkir, at kapitaleigararnir ábyrgjast sum meginregla einans við tí innskotna kapitalinum fyri skyldurnar hjá felagnum.

Tó kunnu persónar, sum vara av felagnum, undir ávísum umstøðum, koma undir endurgjaldsábyrgd. Harumframt kunnu brot á Vinnufelagalógina viðføra revsiábyrgd.

**15.1 Endurgjaldsábyrgd**
Stovnarar og limir í leiðsluni hjá einum íverksetarafelagi kunnu, undir ávísum umstøðum, koma undir endurgjaldsábyrgd sum liður í útinnanini av teirra starvi.

Sama er galdandi fyri grannskoðarar, metingarfólk, førarar av eigarabókum, rannsóknarfólk og møguligar likvidatorar.

Endurgjaldsábyrgdin fyri nevndu bólkar fylgir vanligu endurgjaldsregluni – t.e. culpa-regluni. Endurgjaldsábyrgd eftir Vinnufelagalógini er sostatt treytað av, at tann ið kemur undir endurgjaldsábyrgd, við vilja ella við óforsvarligari atferð (av ósketni) hevur volt nøkrum fíggjarligt tap.

Ein íverksetarapartahavi kann eisini verða álagdur endurgjaldsábyrgd fyri fíggjarligt tap, sum

viðkomandi við vilja ella við sera óforsvarligari atferð (grovum ósketni) hevur volt felagnum, øðrum kapitaleigarum ella øðrum. Í hesum føri skal sostatt meira til fyri at koma undir endurgjaldsábyrgd.

Endurgjaldsábyrgdin fevnir um fíggjarligt tap, ið er volt felagnum, íverksetarapartahavunum, kreditorunum og øðrum triðjamanni.

### 15.2 Nær kemur mann undir endurgjaldsábyrgd?

Tað er leiðslan, sum grundað á avgerðir og handilsligar metingar, virkar og skipar virksemið hjá einum íverksetarafelag.

Í útgangsstøði er tað ikki møguligt at koma undir endurgjaldsábyrgd, um avgerðirnar hjá einum leiðslulimi eru væl grundaðar, og ikki tilætlað hava til endamáls at viðføra, at onnur líða eitt fíggjarligt tap.

Leiðslan hevur skyldu til at virka aktivt í mun til raksturin av felagnum. Hetta merkir eisini, at roynt verður at venda einari møguligari neiligari menning.

Um leiðslan hjá felagnum er óvirkin ella letur letur vera við at halda seg upplýsta um fíggjarligu støðuna hjá felagnum, kann hetta føra til endurgjaldsábyrgd. Um mett verður, at tað ikki er møguligt at halda fram at reka íverksetarafelagið við einum forsvarligum rakstri, hevur leiðslan skyldu til at steðga rakstrinum til tess at forða fyri, at starvsfólkið, handilsfelagar og onnur vera fyri fíggjarligum tapi.

Fyri íverksetarapartahavar er endurgjaldsábyrgd sum nevnt treytað av, at íverksetarapartahavin hevur handlað sera óforsvarligt (við grovum ósketni). Ein íverksetarapartahavi kann t.d. koma undir endurgjaldsábyrgd, um hann á aðalfundinum velur at atkvøða fyri at góðkenna ein ársroknskap, sum hann veit er ósannur. Eitt annað dømi er, at hann atkvøður fyri einari ætlan, sum gevur felagnum eitt tap, men viðkomandi sjálvum ella øðrum eigarum ein ógrundaðan fyrimun, og hann er vitandi um hetta.

Um fleiri koma undir endurgjaldsábyrgd fyri sama skaða, hefta hesir persónliga og við samábyrgd. Hetta merkir, at øll skuldin kann vera kravd frá einum og hvørjum, sum hevur volt skaðan, og at tann, sum verður álagdur at rinda endurgjaldið, kann krevja lutfalsligt viðurgjald fyri hetta frá hinum, sum koma undir endurgjaldsábyrgd.

### 15.3 Revsiábyrgd

Brot á ávísar ásetingar í Vinnufelagalógini verða revsað við bót.

Revsilógin er galdandi sum ískoyti til Vinnufelagalógina.

Løgfrøðiligir persónar, undir hesum feløg, kunnu verða revsaðir eftir kapitli 5 í revsilógini

## 16. Fráboðan um stovnan av einum íverksetarafelagi

Tá tú hevur gjørt tey neyðugu skjølini, og felagskapitalurin er fult inngoldin, er klárt at fráboða

felagið til skrásetingar hjá Skráseting Føroya.

**16.1 Tær kravdu upplýsingarnar og skjølini**
Til at stovna eitt íverksetarafelag krevjast hesi skjøl:

1. Stovningarskjal
2. Viðtøkur
3. Prógv fyri inngjald av kapitali
4. Pass el. líkn. samleikaprógv fyri stovnarar og leiðslulimir sum ikki hava føroyskt p-tal
5. Skrásetingarprógv, um stovnarin er útlendskt felag.

Fráboðanin skal fara fram á tann hátt, at eitt fráboðanarblað skal útfyllast og latast til Skráseting Føroya saman við hinum lógarkravdu skjølunum. Fráboðanarblaðið er at finna á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya, www.skraseting.fo, við at trýsta á "FELØG" og eftir tað "Stovna felag".

Afturat fráboðanarskjalinum, skal leggjast við:

- Stovningarskjal við viðtøkum. Um viðtøkurnar ikki eru ein partur av stovningarskjalinum, skulu tær viðleggjast fyri seg. Viðtøkurnar skulu vera dagfestar sama dag sum stovningar-skjalið. Harumframt skal stovnarin ella stovnararnir undirskriva viðtøkurnar og stovningar-skjalið.

- Skjalprógvan av kapitali. Sum skjalprógvan fyri kontantum inngjaldi av felagskapitalinum, kunnu hesir hættir vera nýttir í sambandi við fráboðanina**:**
    - Ein egin-váttan, um felagið verður stovnað við einum felagskapitali á 25.000 kr. ella minni. Sí vegleiðing um eginváttan á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya, www.skraseting.fo, við at trýsta á "FELØG" og síðan "Stovna felag".
    - Ein banki váttar, at kapitalurin er inngoldin á bankakontuna hjá felagnum.
    - Ein advokatur ella ein grannskoðari váttar, at kapitalurin er inngoldin á bankakontuna hjá felagnum, eina klientkonto ella finst sum kontantur kassapeningur.

Skrásetingargjaldið fyri skráseting av einum íverksetarafelag er 2.500 kr. umframt 4‰ av innskotspeninginum. Sí kunngerð nr. 87 frá 11. juni 2009 um gjøld Skráseting Føroya fyri parta- og smápartafeløg.

Í sambandi við skrásetingina av einum ÍVF, skulu hesar upplýsingar vera við:

- Navn og møgulig hjánøvn hjá felagnum. Tað er ókeypis at taka upp til 5 hjánøvn.
- Heimstaðarbústaður hjá felagnum.
- Stovningardagfesting.
- Endamálið hjá felagnum.
- Fult navn, funktión í felagnum, føðidagur ella skrásetingarnummar og adressa hjá stovnarum og leiðslulimum.
- Støddin á kapitalin og inngjald.
- Roknskaparárið og fyrsta roknskaparárið.

## 17. Umskráseting til vanligt smápartafelag

Eitt íverksetarafelag kann umskráseta seg til eitt vanligt smápartafelag, um felagskapitalurin og tann bundni tiltakspeningurin tilsamans í minsta lagi er 50.000 kr.

Tað er aðalfundurin hjá felagnum, sum kann taka avgerð um umskráseting. Í sambandi við avgerðina um umskráseting, skal aðalfundurin broyta viðtøkurnar hjá felagnum, so at tær lúka vanligu krøvini fyri smápartafeløg. Navnið hjá felagnum skal m.a. broytast, so at íverksetarafelag ella ÍVF verður broytt til smápartafelag ella Sp/f.

Avgerð um umskráseting av einum íverksetarafelag til eitt vanligt smápartafelag skal fráboðast til Skráseting Føroya. Hjálagt skal vera eitt avrit av aðalfundinum, tillagaðar viðtøkur og ein váttan frá einum metingarfólki um, at kapitalurin er til staðar.

## 18. Avtøka av íverksetarafelagnum

Eitt íverksetarafelag kann verða avtikið á sama hátt sum eitt vanligt smápartafelag, t.v.s. antin við gjaldsváttan ella sjálvbodnari avtøku.

Skráseting Føroya kann harumframt biðja skiftiréttin um at tvingsilsavtaka íverksetarafelagið, um:

- Felagið ikki letur ársfrásøgnina hjá felagnum inn rættstundis
- Felagið ikki lýkur krøvini í Vinnufelagalógini um leiðslu og grannskoðan, ella
- Ikki ber til at seta seg í samband við felagið á tí fráboðaða heimstaðarbústaðnum.